ítróttur

Nr. 44 • hósdagur • 2. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Todi millum størstu hetjurnar í FCK

**Todi Jónsson endaði ovarlaga í eini atkvøðugreiðslu millum FCK-fjepparar um, hvørjir eru teir størstu spælararnir í søguni hjá felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Todi Jónsson spældi 207 dystir fyri FCK, og við sínum 68 málum er hann tann mest skorandi spælarin í felagnum nakrantíð*

Í eina tíð hevur tað verið gjørligt at atkvøða á heimasíðuni hjá FCK um, hvørjir spælarar eru teir størstu í søguni hjá felagnum. Og nú avdúkar heimasíðan hjá FCK leypandi, hvørjir spælarar eru ovast á listanum.

Føroyski fótbóltsspælarin Todi Jónsson var ein væl umtóktur spælari í FCK, og tað sæst eisini aftur í atkvøðugreiðsluni, tí Todi endaði á fimta plássi.

Todi Jónsson spældi 207 dystir fyri FCK, og við sínum 68 málum er hann tann mest skorandi spælarin í felagnum nakrantíð. Todi er eisini í toppinum, tá ið tað ræður um tal á dystum fyri FCK, tí hann er nummar 5 á tí listanum.

**Kundi blivið enn størri**

Todi Jónsson flutti í 1997 til FCK at spæla, eftir at hann hevði roynt seg í Lyngby í nøkur ár. Todi spældi í átta ár fyri FCK, og hann var við til at vinna fleiri meistaraheiti og onkra steypakapping.

Harafturat spældi Todi eisini við í 18 europeiskum dystum fyri FCK, og har skoraði hann heili 9 mál.

– Tíverri var Todi ofta skaddur, og tað var kanska við til at forða fyri, at hann fekk sítt altjóða gjøgnumbrot og fekk ein sáttmála í einari av teimum størru europeisku kappingunum, skrivar heimasíðan hjá FCK.

Eitt er so vist, áskoðararnir hjá FCK hava ikki gloymt teirra føroyska álopsspælara, og Todi kann fegnast um, at hann telist millum teir avgjørt størstu profilarnar í FCK nakrantíð.

# Hickersberger vildi helst spælt ímóti Føroyum

**Í 1990 kostaði tað Josef Hickersberger starvið sum landsliðsvenjari í Eysturíki, tí Føroyar vunnu ein sjokksigur á hansara liði í Landskrona. Nú ynskir Hickersberger, sum aftur er landsliðsvenjari, sær ein nýggjan dyst ímóti Føroyum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tá ið Føroyar púra óvæntað vunnu á Eysturríki í Landskrona í 1990, gav tað eysturríkarum eitt sjokk fyri lívið, og grasteppið var samstundis rykt undan venjaranum Josef Hickersberger.

Hann noyddist at leggja kongin og fara úr starvinum, og tað tók honum fleiri ár at koma fyri seg aftur sum venjari.

Men Hickersberger er komin fyri seg aftur, og hann telist aftur millum fremstu venjararnar í Eysturríki. Í fjør fekk hann aftur ábyrgdarfullu uppgávuna sum landsliðsvenjari hjá Eysturríki.

**Helst ímóti Føroyum**

Í einari samrøðu við Die Presse sigur Hickersberger, at hann kundi hugsa sær at spælt ímóti Føroyum aftur.

Fyrsti dysturin hjá Hickersberger, nú hann aftur er landsliðsvenjari hjá Eysturríki, var ímóti Kanada í gjárkvøldið, og blaðið vildi undan dystinum vita, um hetta var ein hóskandi avbjóðing hjá honum.

– Hesin dysturin var avtalaður, áðrenn eg tók við starvinum. Eg hevði helst viljað spælt ímóti Føroyum, helst á uttanveltaðum vølli. Tað hevði verið stuttligt, ha? Eg skal í øllum førum viðurkenna, at tað hevði kenst væl hjá mær, sigur Hickersberger við blaðið.

Dysturin ímóti Kanada á heimavølli í gjárkvøldið endaði við 2-0 til Kanada, so byrjanin var ikki tann besta hjá Hickersberger.

Men kanska hann fær kjansin ímóti Føroyum aftur...



*Josef Hickersberg sigur farvæl við áskoðararnar hjá Rapid Wien. Nú er Hickersberger aftur landsliðsvenjari í Eysturríki. Tað hevur hann ikki verið síðani lagnudagin í Landskrona fyri meira enn 15 árum síðani*

*Mynd: Scanpix*

## Tað verður lutakast

Ósemjan millum londini í okkara EM-bólki hevur nú við sær, at UEFA fer at kasta lut um dystarskránna í bólkinum.

Føroyar hava saman við Fraklandi, Italia, Ukraina, Skotland, Litava og Georgia roynt at funnið eina semju um, nær dystirnir millum londini skulu spælast, men tað bar ikki til at finna semju. Reglarnar siga, at so skal UEFA hava lutakst um, hvussu dystirnir verða spældir, og UEFA hevur nú boðað frá, at hetta lutakast verður Nyon tann 9. mars.

FSF heldur, at hetta kann hava sera óhepnar fylgjur við sær, tí nú hava Føroyar onga ávirkan á, hvussu dystirnir verða lagdir.

**ek**

## Italia knústi Týskland

Italska landsliðið er ikki at spæla við. Mikukvøldið vunnu italiumenn, sum eru í sama EM-bólki sum Føroyar, heili 4-1 á Týsklandi. Hini londini í okkara bólki høvdu misjøvn úrslit.

Týskland, sum verður vertur fyri HM-endaspælinum í summar, fekk av at vita í dystinum ímóti teimum himmalbláu italiumonnunum. Longu áðrenn ein tími var spældur av dystinum, hevði Italia skorað fýra ferðir, og tað var lítil troyst í málinum, sum Robert Huth gjørdi fyri Týskland átta minuttir fyri leiklok.

Málini hjá Italia vórðu skorað av Alberto Gilardino, Luca Toni, Daniele De Rossi og Alessandri Del Piero.

Fleiri av hinum londunum, sum Føroyar eru komin í bólk saman við, spældu venjingardystir mikukvøldið, men úrslitið vóru misjøvn.

Frakland var fyri einum vónbrotið, tá ið teir taptu 2-1 á heimavølli ímóti Slovakia. Slovakar komu á odda 1-0, áðrenn Frakland javnaði. Og best sum Frakland royndi at fáa vinnandi málið, sló Slovakia til aftur og skoraði sigursmálið.

Skotland spældi á heimavølli ímóti Sveis, og sveisar vunnu dystin 3-1.

Tey bæði smærru londini, sum eru afturat Føroyum í EM-bólki B. Litava var í Albania og vann 2-1, og Georgia vann 2-0 á Malta.

**ek**